# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Cosmin og Monica farin aftur til Rumenia

**Í døgunum 24. september til 05. oktober vitjaðu Rumensku hjúnini Monica og Cosmin Giurgiu í Føroyum. Tey vitjaðu í fleiri samkomum, har tey greiddu frá arbeiðinum innan fongsulsmissjónina, Rescue Mission, sum hevur drivið sosialt-evangeliskt arbeiði í m.a. fongslunum í býunum Aiud og Arrad**



*Monica og Cosmin inni hjá Jenis av Rana*

Hetta er teirra fyrsta vitjan í Føroyum. Tey eru ávikavist 41 og 38 ára gomul og eiga tríggjar døtur.

Tey vitjaðu hesi støð: Ungdómsmøti í Berøa, Saltangará. Skúlan í Kollafirði. Mizpa á Eiði. Evangeliihúsið í Havn. Nebo á Toftum. Siloa í Fuglafirði. Hermon í Norðdepli. Bygdahúsið á Sandi og í Ebenezer. Møti í Evangeliihúsinum varð tikið upp, og verður sent í IKTUS eitt seinni tíðspunkt. Tey vitjaðu eisini á Lindini, har Dánjal á Dul hevði samrøðu við tey, og eisini vitjaðu tey kristiligu sjónvarpstøðina Iktus, har eisini ein samrøða var við tey. Hendan samrøðan hevur verið send fleiri ferðir.

Á øllum støðum komu fólk við stórum áhuga at hoyra um hesa, heldur sjáldsomu tænastuna. Tey vóru ómetaliga glað fyri dagarnar her í Føroyum. Hetta er fyrstu ferð, at tey hava verið á eini slíkari møtiferð, og tey vóru stórliga uppmuntraði av undirtøkuni til møtini og blíðskapinum, sum teimum var vístur í Føroyum. Tey takka samkomum og einstaklingum fyri áhuga og stuðul, og vóna, at bæði samkomur og einstaklingar í Føroyum fara at taka hesa tænastuna til sín og soleiðis gerast ein partur av teirri náði, sum er sjónlig innan hesar fongsulsmúrar í Rumenia.

Teir fyrstu dagarnar búðu tey á Glyvrum, og ímóti endanum búðu tey nakrar dagar í Havn. Tey vóru eisini túrar og fingu høvið at síggja føroysku nattúruna. Tað regnaði við nógvum vindi tað nógva av tíðini, men tey nutu regnið og vindin. Serliga vóru tey betikin av teimum mongu stóru áunum, sum runnu eftir fjallasíðunum, so nær húsunum og koyrivegnum, at tey bæði kundu hoyra og føla vatnið. Tey vitjaðu við Gjógv og norði á Viðareiði, og fingu eisini høvið at síggja brim. Cosmin fór so nær briminum, fyri at fáa nakrar dramatiskar myndir í kassan, at undirritaði mátti rópa á hann um ikki at fara longur út. Tey kenna ikki til brim í Rumenia.

Av tí, at Monica er kommunulækni við egnari klinik, hevði hon áhuga at koma í samband við onkran kommunulækna í Føroyum. Jenis av Rana, kommunulækni, gjørdi eina avtalu við bæði tvey at koma og vitja hann á klinikkini hjá sær. Monica sigur, at hetta var ein sera áhugaverd vitjan, eisini frá einum fakligum sjónarmiði, tí Jenis kundi vísa henni á útgerð, sum hon ikki kendi til í Rumenia.

Tey fóru avstað við flogfari mánadagin 6. oktober og búðu eina nátt í Keypmannahavn. Longu kvøldið eftir vóru tey komin til hús. Cosmin ringdi til undirritaða, tá hann var komin heim, og takkaði so innarliga fyri dagarnar og bað meg heilsa samkomunum og øllum teimum, sum tey vóru komin í samband við undir vitjanini í Føroyum. Tey fóru bæði til arbeiðs dagin eftir, tí nógv arbeiði liggur og bíðar, Monica ímillum sjúklingar og Cosmin ímillum fangar.

**Poul Jóhan Djurhuus**
*gjaranes@olivant.fo*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæra mamma, vermóðir, omma og langomma

**Hildur Isholm**
ættað úr Tórshavn
búsitandi í Herlev

andaðist mánadagin 12. oktober,
81 ára gomul.

Jarðarferðin verður týsdagin 20. oktober
frá Præstebo kirke í Herlev kl. 13.30.

*Tey avvarðandi*
**Hervør, Eivin og Lasse v/ fam.**

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ási Jacobsen** fer til gravar úr Tvøroyrar kirkju hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Ása, kunnu lata Parkinsonfelagnum eina peningagávu, konta í Suðuroyar Sparikassa.

Kistan við **Páll Sumberg Olsen**, lærara, fer úr Dómkirkjuni í Havn hósdagin klokkan 13. Umframt blómur, kann peningur latast børnunum á konto í Eik Banka.

**Anna Midjord**, í Vági, ættað av Økrum, andaðist mánadagin á Landssjúkrahúsinum, 63 ára gomul.

**Malan Djurhuus** andaðist í Skúvoy leygardagin 10. oktober, 72 ára gomul.

**Sæbjørn Poulsen**, Tórshavn, andaðist sunnudagin, 53 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum hóskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni fríggjadagin klokkan 13.

**Hildur Isholm**, búsitandi í Herlev, andaðist 12. oktober 81 ára gomul.

## Dagurin

**14. oktober. Kalixtus**, deyður umleið ár 222. Trælur, sum gjørdist diakonur hjá pávanum og fekk um hendur at standa fyri jarðarferðum teirra kristnu. Summar av katakombunum bera navn hansara.
Veturnætur, vetrarhálvár byrjar.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

---

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 1. nov. hava Kristina og Hans Andrias Jacobsen, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin 7. nov í Bøgøtu 3, Klaksvík. Vælkomst verður frá kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Kristinu og Hans Andrias, kunnu siga frá á tel. 456737 ella 458625.

**Silvurbrúdleyp**
Leygardagin 17. okt. kunnu hjúnini Aud og Siggvard, Joensen, halda silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í heiminum: Lauritsargøta 7, Tórshavn, frá kl. 17.

**90 ára føðingardagur**
Mikudagin 14. okt. verður Helena Simonsen, Klaksvík, 90 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum á Klaksvíkar Sjómannsheimi.

**90 ára føðingardagur**
Sunnudagin 18. okt. fyllir Poul Jacobsen, Svínoy, 90 ár. Dagurin verður hildin úti í Svínoy leygardagin 17. okt. kl. 19.

**80 ára føðingardagur**
15. okt. fyllir Malla Jacobsen, Norðragøta, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**80 ára føðingardagur**
Týsdagin 20. okt. verður Hildigarð Høghamar, Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 24. okt. á Hotel Eiði Frá kl. 18. Tey, ið vilja heilsa uppá Hildigarð, verða biðin at siga frá á tlf. 423045 (Hildigarð), 283541 (Annsy), 229727 (Nomi) áðrenn 17. okt.